# ÐSKVINNAN ANDANSINUM




*Ikki fyrr enn í 1973 fekk Josephine Baker uppiborna viðurkenning í USA. Framførslan í Carnegie Hall í New York hevði standandi lógvabrestirnir við sær*

Tann nú heimskenda dansarinnan bleiv eisini partur av danska mentanarumhvørvinum, tá hon varð gestadansari á Dagmarteatrinum í Keypmannahavn summarið 1928.

Eins og aðrastaðni vórðu royndirnar at steðga henni gjørdar til skammar í Danmark, tí navnframir mentanarpersónar tóku hana til sín og talaðu hennara søk. Eitt nú skrivaði gitni danin, Poul Henningsen, í Politiken »Um til ber at læra at vera natúrlig, áttu møður at sent døtur sínar í læru hjá Josephine Baker.«

Í mun til USA var ongin sunduskiljing millum svørt og hvít í Europa, tí her vóru so fá svørt. Ikki harvið sagt, at racisman ikki ráddi fyri borgum í Europa, tí tað gjørdi hon. Men her kundi hon upptraðka sum Josephine Baker, uttan at verða málað svørt!

## Djørv og syrgilig parodi

Fyri Josephine Baker var aðalmálið ikki at undirhalda, men at lata upp eyguni á teimum, sum tvíhildu um rasuskilna og aðra menniskjakúgan.

Hetta gjørdi hon eisini við at luttaka í kjaki og blaðskriving, tá tað lá fyri. Í blaðgrein frá summarinum í Keypmannahavn skrivar hon: »Gævi satt, at framkomni heimurin einaferð megnar at drepa rasuhatrið og loyvir øllum rasum at tráast eftir vakurleika.«

Kynstrið, sum Josephine Baker meistraði fram um onnur var, at hon skilti og brúkti eintáttaðu ímyndinar um rasurnar og teirra eyðkenni, í listini. Hon var somikið rúmlig, at hon visti, at við at yvirspæla stereotypurnar, kundi hon vera við til at bróta tær niður.

Til dømis í banandansinum, har hon spælir primitiva ímyndin av fría og villa, sexuelt óspilta upprunafólkinum í urskóginum. Á siviliseraða pallinum dansar hon spillnakin runt við eksotiskum, falliskum eftirgjørdum bananum. Ein djørv, og eisini syrgilig, parodi.

Í dag kanska eitt sindur naivt, men nýskapandi í samtíðini.

## Ættleiddi 12 børn

Hesi árini fekk Josephine Baker eisini stóra undirtøku sum fotomodell og filmsstjørna í Fraklandi. Í 1937 gjørdist hon franskur statsborgari, og undir 2. heimskríggi var hon virkin í fronsku mótstøðurørsluni, millum annað sum njósnari. Sagt varð, at týsku hermennirnir gjørdust so hugtiknir av henni, at hon ótarnað slapp tvørtur um øll landamørk við loyniligum skjølum. Fyri hetta avrik varð hon stórliga heiðrað av fronsku stjórnini eftir krígslok.

Í 50'unum og 60'unum gjørdist hon virkin í amerikanska borgararættindarørsluni, og gekk, saman við vinfólkunum Martin Luther King Jr. og konuni Coretta Scott King, á odda fyri einari »ikki harðskapsleið« til tess at avtaka rasuskilnaðin í suðurstatunum.

Um sama mundið fór hon eisini undir eina aðra forvitnisliga verkætlan: At ættleiða børn úr ymsum londum við ymsum liti og uppruna. Tey 12 børnini búðu saman við henni á slottinum, Les Milandes, sum eisini var karmur um felagsskapin »Barnanna ST«. Endamálið við hesum var at prógva, at fólk við ymiskum uppruna kunnu liva friðarliga saman í sátt og semju.

At figgja »ælabogafamiljua«, sum hon rópti hana, skipaði Josephine Baker stórslignar konsertir kring Europa í 50'unum og 60'unum. Har upptraðkaði hon í upplýstum stjørnudusti við tekkiligum kjólum, glitrandi pailettum og tølandi fjaðrum – sum ein sonn, men eisini sterk, diva.

*Josephine Baker ættleiddi 12 børn av ymsum uppruna. »Ælabogafamiljan« skuldi prógva, at fólk við ymiskum uppruna kunnu liva friðarliga saman í sátt og semju*

